# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Hóskvøldið 9. oktober**
***Norðoya vistarheim:*** kl. 19.30 Andakt - Elsa Funding

**Fríggjakvøldið 10. oktober**
***Christianskirkjan:*** kl. 20 Ungdómsguðstænasta, Hanus Simonsen

**21. sunnudag e. trinitatis**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Sonja Klein, konfirmatión
***Hoyvíkar kirkja:*** kl. 11 Sverri Steinhólm, konfirmatión
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, Bergur D. Joensen. konfirmatión
***Miðvágs kirkja:*** kl. 11 v/ Ann D. Hansen, presti
***Sørvágur:*** kl. 11 altargongd David Johannesen
***Gásadalur:*** kl. 11 John Myllhamar
***Kvívík:*** kl. 12, Theodor E. D. Olsen
***Vestmanna:*** kl. 11, konfirmatión, Inga Poulsen Dam
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11 (altarg.) Martin R. Jacobsen
***- talvan gongur fyri Sunnudagsblaðið***
***Elduvík:*** kl. 12, altargongd, Uni Næs
***Rituvíkar kirkja:*** kl. 11, konfirmatión, Meinhard Bjartalíð
***Glyvra kirkja:*** kl. 11, lestur og sunnudagsskúli
***Søldarfjørður:*** kl. 11, lestur og sunnudagsskúli
***Sjóvar kirkja:*** kl. 12 konfirmation v/ Henning Bøgesvang
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10, Andakt, Elsa Funding
***Viðareiði:*** kl. 12, altarg. Elsa Funding
***Christianskirkjan:*** kl. 11, altarg., Hanus Simonsen
***Árnafjørður:*** kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
***Norðoya røktarheim:*** kl. 14.30 Niels Pauli Danielsen
***Kunoy:*** kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer
***Sandur:*** kl. 11, konfirmatión: Jákup R. Hansen
***Tvøroyri:*** kl. 11, konfirmatión, Jónsvein Bech
***Vágur:*** kl. 11, altarg., Patrick de Neergaard
***Hvalba:*** kl.12.30 Barna og familjuguðstænasta við Símun Jacobsen
***Sandvík:*** kl. 18 Símun Jacobsen

**Lívdin á Brekku 3**
Hóskvøldið kl. 20 Tiltak fyri kvinnur har Cecilia Poulsen fer at greiða frá túrinum í Grønlandi í summar.
Allar kvinnur eru vælkomnar.
**Í Hoyvíkar skúla**
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti har evnið verður »Tankar úr Ápostlasøguni« Beinta Áargarð talar.
kl. 11.30 Samfelagsløta
kl. 12 Á tilbiðjunarmøtinum talar Jógvan Z. útfrá »Ápostlasøgan - Kostnaðurin at fylgja Jesusi (Áp 7-9)«.
Kl 12 Sunnudagsskúli
Undir báðum møtinum verður barnaansing.
Møtini eru at hoyra beinleiðis á www.livdin.fo
Leita á okkara heimasíðu, har ber til at hoyra nógvar sangir og talir.

**Fra Meinigheitshúsinum í Havn**
Mikukvøld kl 20.00 venur felagskórið
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Reimund Langgaard, evni: Hin fysta hvítusunna.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangeliskt møti v/ Reimund Langgaard.
Í kvøld 6/10 kl. 20 verður evniskvøld við Sten Palmquist Evni er: Tá vit missa ein kæran. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin. 8 okt Juniorhornvenjing kl. 14.
Bønarmøti kl. 15.
Hósdagin 9. okt. Heimaforbund kl. 20.
Sunnudagin 12. okt. Halgunarmøti kl. 11.
Sunnudagsskúli kl. 14.
Bønar løta kl. 17.30.
Møti kl. 18.

**Ebenezer**
Mikudag kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdag kl. 20 Ungdómsmøti – Evni: Evolutión og Skapan – Talari: Símun Absalonsen.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12.00 Sunnudagsskúli,
kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánadag kl. 12.30 Andakt.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Frá Missiónshúsinum við Landavegin**
Møti hóskvøldið kl. 20.
Sunnukvøldið møti kl. 18 v/ Sigurd Sørensen.

**Hebron á Argjum**
Mikudagin kl. 10 Mammur biðja fyri børnunum,
kl. 20 Bíbliutími og bønarløta.
Nehemias 13.
Hósdagin kl. 21 Ráðleggingarfundur .
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti,
kl. 11.30 Samvera við drekka,
kl. 12 Sunnudagsskúli. Vegna heystfrítíðiina verður felags sunnudagsskúli
Kl. 12.15: Møti. Thorvald Gaardlykke talar
Hjartaliga vælkomin í Hebron.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv. 75*
Møti: Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12
Sunnukvøldið kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/ uppbyggingarmøti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum. Kl. 18 Delli, kl. 20 Chill.
Leygardagin kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 Morgunmøti – Russell Bowels talar.
Kl. 11.30 sunnudagsskúli.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Mikudagin kl. 17.15 barnakórið.
Fríggjakvøldið kl. 19 MiniSalt.
Leygarkvøldið kl. 20 enskt møti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 19.30 ungdómsmøti.
http://www.gospel.fo

**Brúdleyp**
Leygardagin 11/10-08 kl 16.00 giftast í Vedbæk kirkju Hanna Dalsgarð av Argjum og Christian Korsø Jensen úr Vedbæk. Brúdleypið verður hildið innbodnum á Mikkelgaard Rungsted Strand 211. 2950 Rungsted.

Leygardagin 11. oktober kl. 15.00 giftast í Havnar Kirkju, Miriam Magnussen, úr Miðvági og Høgni Johannesen, Tórshavn. Dagurin verður hildin í Bridgehúsinum í Gundadali frá kl. 17.00-22.00. Tey, sum vilja gleða okkum hendan stóra dag, verða biðin um at siga frá innan 7. oktober á telefon 254620 og 283580 ella á t-posti: mimagnussen@yahoo.dk

Leygardagin 18. oktober kl. 15.00 giftast í Vágs kirkju Leila Lisberg úr Vági og Elian Hansen úr Saltangará. Veitslan verður fyri innbodnum í VB-húsinum kl. 19.00.



Leygardagin 11. oktober kl. 14 giftast í Býráðshøllini í Klaksvík Beinta Olsen úr Klaksvík og Eyðfinn Jacobsen úr Haraldssundi. Eftir vígsluna verður móttøka, har øll eru hjartaliga vælkomin. Veistlan verður fyri innboðin á Klaksvíkar Sjómansheimi kl. 18.

**70 ára føðingardagur**
10. okt verður John Oluf Jacobsen, Glyvrar 70 ár. Føðingardagurin verður hildin heima leygardagin 11. okt. frá kl. 18, øll eru vælkomin.

Sólvá M. Nielsen verður 70 ár 9. okt. Dagurin verður hildin fríggjadagin 10. okt. kl 19.00 í Samljóð, Skopun. Tey sum vilja gleða Sólvu við at koma í føðingardag, biða vinarliga siga frá áðrenn mánadagin 6. okt. á tlf. 361918 ella 361318

Fríggjadagin 10. oktobur fyllir Maria Danielsen, Skúlagøtu 4, Tórshavn, fødd Johannesen, ættað av Oyrabakka, 70 ár. Hon er burturstødd føðingardagin.

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 25. oktober verður Thordis Skaalum, Sørvágur 60 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Miðvági 25. oktober kl. 19.00. Tey, ið vilja verða við til at gleða meg og gera dagin hugnaligan, vinarliga ringi til tlf. 333119 ella 227216 í seinasta lagi 10. oktober. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Týsdagin 28. oktober verður Elisabeth Matras-Olsen, Trongisvágur 60 ár. Dagurin verður hildin á Seglloftinum leygardagin 25. oktober kl. 19. Tey, ið vilja gleða meg við at koma, verða biðin um at siga frá innan 15. okt. á tlf. 371528 ella 263060.

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 15. oktober kunnu Edva og Elibert Jacobsen, Fuglafirði halda silvurbrúðleyp. Opið hús við køldum borði verður í bygdarhúsinum í Leirvík frá kl. 18.00. Øll eru hjartaliga væl komin.



Mikudagin 5. november kunnu hjúnini Signa og Jóhan Joensen, Kollafirði halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Ítróttarhøllini í Kollafirði leygardagin 8. november kl. 1830. Tey, ið vilja halda dagin saman við okkum, verða biðin at siga frá á tlf. 721628, 213448 ella teldupost: johsig@post.olivant.fo áðrenn 31. oktober.

**Gullbrúdleyp**
Týsdagin 25. november hava hjúnini Henny og Martin Juul Jarnskor, Norðragøta, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 29. nov. kl. 18.00. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, vera vinarliga biðin um at siga frá innan 15. nov. á tlf. 442192, 441795 (Anita) ella 441995 (Unn).

**30 + 30 ár**
1. og 17. november vera Tóra Láberg og Sonja Tungá 30 ár. Føðingardagurin verður hildin í Samljóð í Skopun 1. november 08 kl. 18.00. Tey, sum vilja gleða okkum við at koma, verða biðin um at siga frá áðrenn 25. oktober á tlf. 222223 Tóra og 580075 Sonja.



# HEILSANIR



**Góði fitti pápi**
Hjartaliga tillukku við 19 ára føðingardegnum 7. okt.
**Ynskir sonur tín Torbjørn**



**Góða langomma**
Hjartaliga tillukku við 88 ára degnum 7. okt. Alt tað besta ynskja vit tær.
**Heilsan Agnar, Anna og Dávid**



**Góða fitta Lív**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 12 ára føðingardegnum 12. okt.
**Heilsan mamma og babba**



**Góða stórasystur**
Hjartaliga tillukku við 12 ára degnum. Oftast sæst tú í hesum vinklinum, enntá sum her í brúðargentukjóla, ha ha.
**Bestu heilsanir beiggjanir**